## Fimm flugur í Kvinnufelagshúsinum

Tær fimm damurnar í handverkssamtakinum "Fimm feitar flugur" seldu lutir ymsastaðni um jólini í fjør. Í samband við Mentanarvikuna vísa tær fram í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Kreativu sálirnar aftanfyri "Fimm feitar flugur" eru Mikkalina Norðberg við Rabarbuglas, Jórunn Dánialsdóttir, Lív Dam, Erla Matras Jensen og Durita Dam (myndin). Tær hava framleitt alt millum himmal og jørð til framsýningina. Har eru glaslutir, taskur, húgvur, teppi, pútur, myndir, gávu- og prýðislutir, smúkkur og nógv, nógv annað úr so ymiskum tilfari sum ull og spreki, beini og glasi, gróti og toyi, perlum og lørift. Framsýningin er opin fríggjadag 29. oktober kl. 15-21 og leygardag 30. oktober kl. 11-18.
Kaffisøla verður í húsinum meðan framsýningin er.



# RINGAR TÍÐIR HAV



**VINNUSTEVNA** Um onkur helt, at vinnulívið aftrar seg við at luttaka á eini føroyskari vinnustevnu í hesum fíggjarligu trongu tíðum, so fer viðkomandi skeivur. - Nei, tað er heldur hinvegin, sigur Rannvá Troest, sum er ein av samskiparunum av FAROEXPO. - Áhugin er nógv størri, enn vit høvdu roknað við.

Orð & mynd: Snorri Brend

**Runavík:** – Vit høvdu sett nøsina upp ímóti 60 luttakarum. Men vit verða faktisk 70 – tað eru 15 fleiri enn í fjør!

Tað er nógv at gera her á skrivstovuni hjá Virkisráðgeving í Saltangará. Nógv skjøl liggja á borðinum, telefonin ringir í heilum og tað merkist ein ávísur spenningur í hølunum.

Nú er av álvara farið at nærkast til stóru vinnustevnuna FAROEXPO, sum verður í komandi viku. Tey seinastu tingini skulu fáast uppá pláss, tí nógvir smálutir skapa ta stóru ráðstevnuna við teimum 70 luttakarunum.

Líkt er til, at tað arbeiðið sum hevur verið gjørt síðani 2005 er við at bera ávøkstur. Í dag er FAROEXPO ein vinnustevna sum spyrst bæði í Føroyum og í grannalondum okkara.

Í ár fara nevniliga 70 fyritøkur at taka lut. Av teimum eru tær 50 úr Føroyum, meðan 20 eru útlendskar.

– Tað vísir seg, at hóast kreppa er kring allan heimin, so ynskja fyritøkurnar at satsa, kanska ongatíð so nógv sum júst í dag.

**» Vit høvdu sett nøsina upp ímóti 60 luttakarum. Men vit verða faktisk 70 - 15 fleiri enn í fjør**

– Hetta ger so aftur tað, at áhugin fyri vinnustevnuni er vorðin so stórur. Nú byrjar tað at líkjast tí, sum vit av fyrstu tíð ætlaðu við FAROEXPO, vísir Rannvá Troest á.

### Stevna saman

Tað eru sjálvandi mong heiti ið ein kann geva eini so stórari og fjølbroyttari stevnu sum hesari. Eitt orð sum »ráðstevna« er helst ikki nøktandi. Heldur ikki orðini framsýning ella stevna.

Fyrireikararnir hava tí valt eitt heilt annað og betri orð, og sum á mangan hátt eisini dekkar innihaldið og endamálið. Orðið er: Vinnustevna.

Í ár verður henda vinnustevnan fyriskipað á sætta sinni. Og sigast kann, at undirtøkan fyri henni bara er vaksin ár undan ári.

Tað byrjaði við eini minni ráðstevnu á 2005, tá Eysturoyar Vinnulívsfelag, saman við Runavíkar kommunu, legði lunnar undir hetta tiltakið.

### Somu fyritøkur

FAROEXPO byrjaði í smáum, men hevur í dag ment seg til almikið, til at vera eitt stórt og profesjonelt tiltak, – ja, eitt tiltak sum tær ym-

Framhald á síðu 24

## Hugskot úr Stavanger

**Hugskotið til FAROEXPO er komið úr stóru norsku oljumessuni, sum verður hildin annaðhvørt ár í norska oljuhøvuðsstaðnum Stavanger - Offshore Northern Seas (stytt: ONS) - sum varð hildin í august mánaði í ár.**
**Her hevur ein megnað at samantvinna vinnulív og mentan. Og tað er júst hetta, sum ein somuleiðis hevur megnað á serstakan hátt í Runavík seinastu seks árini.**
**FAROEXPO byrjaði í smáum í 2005, men hevur so líðandi, í góðum hondum hjá starvsfólkunum í Virkisráðgeving, ment seg til eina vinnustevnu sum spyrst.**